### Kjólin hjá Marilyn Monroe heiðraður

Hvíti kjólin hjá Marilyn Monroe í The Seven Year Itch, er tað størsta ikonið innan kjólar í filmum. Hetta er úrslitið av atkvøðugreiðslu á heimasíðuni hjá bretsku mótafyritøkuni missbutterfly.co.uk. Kjólin, ið er best kendur fyri at fúka upp av gjóstrinum úr eini rist, vann kappingina framman fyri kjólum sum tann hjá Julia Roberts í Pretty Woman og tann sum Robin Williams brúkti í Mrs. Doubtfire.



### Loyndarmálið handan ungu húðina

Sambært British Vogue hevur Joan Collins avdúkað loyndarmálið, ið ger, at hennara húð sær so ung út. Talan er um eitt andlitskrem, ið verður rópt Skin Signaling Serum Age. Cellex-C ger kremið, ið fæst fyri eini 400 dollarar fyri dunkin. Tað tykist merkisvert, at avdúkingin hjá Joan Collins kemur samstundis við, at sjónleikarkvinnan hevur skrivað eina stóran sáttmála við Cellex-C.



## Ummæli



**Hanus Kamban**

# MILLUM TI



**Tann fyrsta audiovisuella útgávan við føroyskum dansi er nú til taks. Hósdagin tann 7. juni løgdu Kristian Blak og Niels á Velbastað, á eini móttøku í Hornahúsunum í Havn, fram eina audiovisuella útgávu við upptøkum av føroyskum dansi. Sostatt ber nú til hjá áhugaðum at keypa sær fløgur, sum goyma, í sjón og ljóði, tann mest upprunaliga táttin í okkara mentan. Útgávan er tann fyrsta av sínum slag, og talan er sostatt um eina søguliga hending.**

Á hesi DVD-útgávu, sum er á tveimum fløgum, eru brot úr 17 kvæðum, vísum og táttum. Tað mesta av tilfarinum er føroyskt, men har eru eisini fýra danskar vísur. Millum tey føroysku kvæðir, ein kann síggja og hoyra borin fram á hesum fløgum, eru Gongurólvs kvæði, Sigmunds kvæði eldra, Vilmunds kvæði, Flóvin Bænadiktsson, Brestis kvæði og Finnur hin Fríði. Av donskum vísum kunnu verða nevndar De røvere tolv og Kong Sverke.

Tað eru limir í Dansifelagnum í Havn, sum dansa og kvøða. Allar upptøkurnar eru gjørdar í Hornahúsunum í Havn, har hetta dansifelag hevur hildið til tey seinastu, mongu árini. Sjónvarp Føroya hevur gjørt upptøkurnar. Útgevari er plátufelagið TUTL.

### Ljóðmyndin

Tann, sum setir seg at hyggja at hesum upptøkum, gleðist við at sleppa at uppliva føroyskan dans í tí líki, hann enn hevur mangastaðni í Føroyum, virðiliga troddan og við tí spælirúmi millum gleði og dapurleika, tign og kæti, sum kvæðini natúrliga eggja til, og sum skiparans lyndi og háttalag, ið eru ymisk frá menniskja til menniskja, áleggja tí dansandi heildini. Stuttligt er at síggja, at við í dansinum eru fólk úr ymiskum aldursbólkum, og at skipararnir somuleiðis í aldri liggja millum tey áttati og sekstan.

Dansur er fólkslig list, ikki yrkislist í nútíðar merking. Og kortini eru tey krøv, ein góður skipari setir sær, á sín hátt líka so strong sum tey krøv, sum yrkislistin setir. Hinvegin sleppur dansifólkið av natúrligum grundum – júst tí hetta er livandi fólkslig mentan – undan tí út í æsir framdu perfektionismu, sum eyðkennir yrkislistina. Tað er t.d. vanliga ein fyrimunur, at fólk duga kvæðið og taka undir við skiparanum, men nakað krav er tað ikki. Hinvegin eigur dansifólkið at taka undir við niðurlagnum.

Men hetta mál er í dag neyvan so einfalt. Hann ella hon, sum er í einum dansiringi, kann gleðast við at lurta eftir skiparanum, eisini um undirtøkan er lítil. Sagt verður enntá, at í gomlum døgum bar skiparin ørindini fram einsamallur. Dansifólkið fylgdi við, lýddi á og kvað so niðurlagið, meðan skiparin hvíldi røddina. Øðrvísi er í dag, og øðrvísi er ið hvussu er við eini slíkari útgávu, tí her er brúkarin ikki ein sum dansar, men ein óvirkin hyggjari og lurtari. Her er tað helst ein fyrimunur, fyri klangin, at skiparin fær eina ávísa undirtøku. Um fleiri røddir hoyrast, og kvinnuligar millum tær mannligu, verður

Sosialurin